## Demokratiið viknar eystanfyri

Hugtøk sum kapitalisma og demokrati eru ikki so høgt í metum í fleiri av teimum fyrrverandi sovjetsku lýðveldunum og londunum í Eystur- og Miðevropa sum fyri 20 árum síðani, tá múrurin í Berlin fall. Ein meiningakanning, sum Pew-stovnurin í Washington hevur gjørt, vísir, at í Ukraina eru bara 30 prosent fegin um fleirflokka-skipanina. Tað áskoðanina høvdu 72 prosent í 1991. Í gamla Eystur-týsklandi er stuðulin til demokratiið minkaður heili 85 prosent, og í Ungarn er undirtøkan fyri marknaðarbúskapi minkað 34 prosent tey seinastu tjúgu árini.

## Karzai fær krøv

Hamid Karzai fær fimm ár afturat sum afghanskur forseti, men eygleiðarar eru á einum máli um, at hann stendur mun-andi veikari nú enn undan forsetavalinum, sum ongan vinn-ara fekk. Fleiri vesturlendskir leiðarar krevja, at Karzai skal gera tað, sum hann hevur lovað. Hvítu Húsini siga, at Barack Obama ringdi til Karzai í gjár og gjørdi honum greitt, at USA fer at halda eitt vakið eyga við, hvat hendir í Afghanistan frameftir. Karzai fekk eisini at vita, at tann almenna umsitingin má skipast betur, og at herurin má kvika sær meiri við at manna og venja trygdardeildirnar.



# Klaksvíkingar ikki brúk fyri neyðhjálp

**Borgarstjórin í Klaksvík er bæði firtin og særd um, nú ávísir politikarar rógva framundir, at Landsstýrið skal keypa býráðshúsið í Klaksvík fyri at bjarga kommununi burtur úr eini fíggjarligari neyð**

ALMENN STØRV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta er virkuliga langt úti.

Gunva við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík, er bæði firtin og særd um tað viðferð, sum Klaksvík hevur fingið frá ávísum løgtingsmonnum seinasu dagarnar.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kannar møguleikan fyri at keypa býráðshúsið í Klaksvík til almenna umsiting og at flyta Taks í Saltangará til Klaksvíkar fyri at savna alt norðurøkið hjá Taks undir sama takið fyri at rationalisera raksturin.



Hetta hevur givið summum politikarum illgruna um, at talan er ein góðan, gamlan rossahandil, har landið skal keypa býráðshúsið í Klaksvík fyri at bjarga Klaksvíkar Kommunu burtur úr einum fíggjarligum óføri.

*- Málið um at flyta Taks til Klaksvíkar er farið so langt av sporinum, sum tað sleppur. Tað, sum landspolitikarar føra fram, er beinleiðis ósatt og teir áttu at verið meiri at sær komnir, sigur Gunvá við Keldu, borgarstjóri í Klaksvík*

- Hetta er heilt langt úti, staðfestir Gunvá við Keldu.

Hon ásannar, at Klaksvíkar kommuna hevur eina stóra skuld at dragast við.

Men at talan er um eitt fíggjarligt óføri, sum kommunan má hava almenna neyðhjálp til at koma burturúr, er heilt burturvið.

Klaksvíkar Kommuna skyldar 170 milliónir, sum er hálvonnur skattaálíkning.

- Næsta ár ætla vit at gera íløgur fyri 20 milliónir og tað er ikki tekin um eina kommunu í djúpari kreppu, staðfestir hon.

Hinvegin staðfestir hon eisini, at tað hevði fingið stóran týdning fyri Klaksvík at fingið almenn arbeiðspláss til Klaksvíkar tí kommunan er ógvuliga tengd at gongdini í fiskivinnuni.

- Men at rógva framundir, at her skal vera talan um rossahandlar og neyðhjálp, er ótrúliga ódámligt, tí so er málið farið so langt av sporinum, sum tað kann, leggur hon afturat.

- Tað er beinleiðis ósatt og landspolitikarar áttu at verið meiri at sær komnir, skoytir hon upp í.

### Langt eftir á mál

Hon váttar eisini, at samband hevur verið millum býráðið og Jóannes Eidesgaard, landssýrismann í fíggjarmálum, har møguleikin hevur verið umrøddur um at landið keypur býráðshúsið til almenna fyrisiting.

- Vit eru opin fyri øllum møguleikum, men enn er hetta málið als ongan veg komið enn.

Hon staðfestir eisini, at enn skal nógv fella upp á pláss, áðrenn ein slík ætlan kann gerast veruleiki og enn hevur býráðshúsið í Klaksvík ikki staðið á sølulista.

Og tann stóri spurningurin er sjálvandi, hvar kommunan so skal húsast, verður hetta býráðshúsið selt.

Tað er ein spurningur, sum býráðið umrøður í løtuni.

Men Gunvá við keldu vísir á, at tað er ein gomul ætlan at selja hetta býráðshúsið og at byggja nýtt býráðshús í miðbýnum.

- Tað hevur leingi ligið í kortunum, men enn er ongin avgerð tikin, sigur Gunvá við Keldu.

# Móttakari til sjónvarpið orsøk til eldsbruna

**Tað er nú staðfest, at tað var ein móttakari til fylgisveinasjónvarp, sum var orsøkin til at eldur kom í eini hús á Stykkinum í heyst**

ELDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ein mótakari til fylgisveinasjónvarp sum var orsøkin til eldur kom í eisini sethús á Stykkinum seinnapartin tann 3. september.

Tað hava tekniskar kanningar nú staðfest.

Men niðurstøðan av kanningini kemur ikki óvart á Michael Gram, politist í Vágum, tí sjónvarpsútgerðin var tað fyrsta, hann fekk illgruna til, tá ið hann kannaði húsið, beint eftir at eldurin var sløktur.

Hann segði longu tá, at tað tað týðiligt, at eldurin var kyknaður við sjónvarpið og tí var øll sjónvarpsútgerðin send til Danmarkar til tekniskar kanningar.

Úrslitið er akkurat afturkomið og niðurstøðan er, at tað var eitt skammlop í tí talgilda móttakaranum til sjónvarpið, sum var orsøkin til eldin.

Politisturin sigur, at maðurin, sum búði í húsinum var til arbeiðis, tá ið eldurin kyknaði.

Og tað var heppið, tí hann er samstundis vísur í, at var hetta hent um náttina, hevði maðurin neyvan sloppið livandi frá tí, tí hóast eldurin var avmarkaður, var roykurin bæði nógvur og eitraður av brendum plasti og tá skal lítið til, áðrenn tað kostar lív.

### Vóru ikki sløkt

Tað varð eisini staðfest í kanningunum, at sjónvarpið og móttakarin bara vóru sløkt á fjarstýringini og sostatt stóðu á "stand by".

Av tí sama var streymur til tólini.

Michael Gram staðfestir, at læran av hesum má vera, at vit fylgja gomlu ráðunum um, at vit skulu altíð sløkkja sjónvarpsútgerðina á vegginum, so at ongin streymur er til tólini, áðrenn vit fara út og áðrenn vit leggja okkum.





*Sjónvarpsútgerðin var ikki sløkt, men stóð á Stand by og tað elvdi til eldsbrunan á Stykkinum fyri tveimum mánaðum síðani*